GÍ-VB 3-0 (1-0):

# Vágbingar søktu VB



*Við sigrinum á VB helt GÍ fast í oddasessinum, meðan VB hinvegin framvegis er fast í botninum av talvuni*
*Mynd: Álvur Haral0dsen*

**Tað mundi smakka illa hjá VB, at bæði Krzystof Popczynski og Símun Samuelsen skoraðu, tá GÍ helt fast í oddasessinum um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

VB var á vitjan í Gøtu sunnudagin. Í sarpisgerði hava vágbingar mangan fingið óvæntað góð úrslit, og tørvurin á einum slíkum var ikki lítil, nú byrjanin hjá VB upp á kappingarárið hevur verið somikið løk.

Fyrstu løtuna av dystinum í Gøtu var tað eisini so, at vágbingar vóru heilt væl við. Bæði liðini royndu líka sum at kenna hvønn annan á tonnunum, og veruliga málmøguleikar var talan at kalla ikki um.

### Settu trýst á

Men spakuliga settu heimamenninir seg alt meira á spælið. Einamest tí hart arbeiðandi miðvøllurin hjá GÍ setti somikið stórt trýst á VB-liðið, at gestirnir høvdu ilt við at fáa nakað veruligt samanhangandi álopsspæl at koyra, og ta var eisini skjótt, at GÍ fekk løn fyri stríðið.

Vágbingar vildu vera við, at talan var um rangstøðu, tá Bartal Eliasen í leysari støðu stútaði móti málinum. Bólturin smeyg sær inn um stólpan, og tá linjuverjin helt flagginum niðri, varð málið eisini góðtikið.

Hetta tók líka sum mótið frá VB, og fyri tað mesta hevði GÍ greiða yvirvág eftir hetta. Teir høvdu eisini fleiri málmøguleikar fyri steðgin, men tað mátti tó bíða nakað, til hol aftur kom á. Og tá vóru tað tveir fyrrverandi VB-leikarar, sum settu punktum.

Fyrst var tað Krzystof Popczynski, sum stóð í góðari støðu, tá Jónreid Dalheim legði innfyri, og seinnu ferðina var tað Símun Samuelsen, sum gjørdist púra leysur, eftir at vágbingar ikki vóru heilt støðufastir í verjuni.

### Trupult hjá VB

Við sigrinum syrgdi GÍ fyri, at teir framvegis hanga við í oddinum. Enn hevur GÍ tó leikt ein dyst fleiri enn HB og KÍ, sum eru nærmastu grannarnir á stigatalvuni, og tí kann væl verða, at støðan er broytt nakað, áðrenn GÍ næstu ferð spælir landskappingardyst. Komandi vikan skal nevnliga nýtast til Toto-fótbólt, og so er fyrimunurin, sum GÍ vann í framskundaða dystinum móti Skála, burtur.

Hugaligt man tað tó undir øllum umstøðum vera hjá GÍ, men tað er ikki júst tað, sum man eyðkenna huglagið í Vági í hesum døgum.

Undan kappingarárinum var málið, at eitt nýtt lið skuldi spælast saman. Fleiri vóru helst tey, sum óttaðust, at hetta kundi fara at kosta á talvuni, og tó at ein ávísur kostnaður helst var íroknaður, so mundi tey í Vági neyvan roknað við, at støðan skuldi gerast somikið hættislig, sum hon nú er.

Vágbingar eru næst niðastir á stigatalvuni eftir fimm umfør, og enn eiga teir fyrsta sigurin til góðar. Eftir at tað fleiri ferðir hevur verið líka við og næstan, hava teir báðir seinastu dystirnir hartil verið lítið sannførandi, og spurningurin er tí helst, hvørt leiðslan fer at taka nøkur stig til at broyta hetta.

Tað hevur verið frammi, at vágbingar møguliga fara at styrkja um hópin við leikara úr donskum felagi, men enn tykist hetta so ikki vera aktuelt.

- Tað er sjálvsagt, at við verandi støðu kann væl vera, at vit fara at styrkja um hópin, sigur formaðurin í VB, John Henrik Holm.

- Men tað verður so ikki í løtuni. Europeiska transfervindeygað er í løtuni stongt, og hóast vit hava haft samband við ymsar leikarar, so hava vit heldur ikki nakað konkret á borðinum her og nú. Tað er í øllum førum greitt, at skulu vit fara eftir nøkrum leikara, so skal hetta vera ein, sum veruliga kann geva liðnum nakað, og tí hava vit ongan skund við at fara eftir fyrstu og bestu loysnini, sigur VB-formaðurin at enda.

Hvussu er og ikki, so fer nú av álvara at tátta í hjá VB. Komandi tríggjar ferðirnar skal liðið tó spæla á heimavølli, og so er spurningurin, hvørt teir megna at broyta nakað við hesum. Fyrst verður talan um vitjan úr Havn, tá meistararnir úr HB koma suður, og síðani verður talan um tveir sera týdningarmiklar dystir, tá fyrst Skála og síðani EB/Streymur koma suður.

### Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 11 |
| 2 GÍ | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 10 | 6 | 4 | 11 |
| 3 KÍ | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 11 |
| 4 NSÍ | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 10 | 4 | 6 | 9 |
| 5 B68 | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 5 | 3 | 2 | 9 |
| 6 B36 | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 7 EB/Streymur | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 6 | 10 | -4 | 5 |
| 8 FS V | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 7 | 12 | -5 | 4 |
| 9 VB | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 4 | 12 | -8 | 2 |
| 10 Skála | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 1 | 11 | -10 | 0 |

Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Karsten From | HB | 4 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 3 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 3 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 3 |
| Birgir Jørgensen | VB | 3 |
| John Petersen | B36 | 2 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 2 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 2 |
| Magni á Lakjuni | EB/S | 2 |
| Eyðfinn Fjalsbak | FSV | 2 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 2 |
| Símun Samuelsen | GÍ | 2 |
| Súni Olsen | GÍ | 2 |
| Andrew av Fløtum | HB | 2 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 2 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 2 |
| Rúni Nolsøe | HB | 2 |
| Atli Danielsen | KÍ | 2 |
| Jústinus R. Hansen | NSÍ | 2 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 2 |

### Dysturin í tølum

**GI-VB 3-0 (1-0)**
1-0: Bartal Eliasen
2-0: Krzystof Popczynski
3-0: Símun Samuelsen
Dómari: Eiler Rasmussen

**GÍ:** Jacek Przybylski – Anton Skoradal, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Jónreid Dalheim, Poul Andrias Jacobsen, Zdzislaw Janik, Símun Louis Jacobsen, Bárður á Lakjunio – Krzystof Popczynski, Símun Samuelsen
**VB:** Bjarni Johansen – Slobodan Madzar, Predrag Zivkovic, Dejan Nicolic – Mortan í Hørg, Michael í Lágabø, Milan Kulic, Kári í Lágabø, Palli Augustinussen – Birgir Jørgensen, Dan Djurhuus



# Barometrið á ferð

**Reportararnir í útvarpssendingini Barometrinum høvdu fríggjadagin leitað sær til Runavíkar á eystanstevnu. Her skipaðu teir fyri brotssparkskapping á fótbóltsvøllinum við Løkin, har ongin minni enn Jens Martin Knudsen stóð ímillum stengurnar**

ÚTVARP
*Ingrid Bjarnastein*



*Barometrið vitjaði í Runavík fríggjadagin. Her varð skipað fyri brotssparkskapping við málmonnunum Jens Martin Knudsen og Tórður Thomsen millum stengurnar*

**Runavík:** Fríggjadagin høvdu runavíkingar forkunnuga vitjan. Talan er um ongan minni enn teir tríggjar reportararnar í útvarpssendingini Barometrinum hjá Útvarpi Føroya, Hera Jacobsen, Kára Sólstein og Elin í Stórustovu.

Í allarfagrasta veðrið høvdu útvarpsfólkini leitað sær út á fótbóltsvøllin við Løkin í Runavík, har skipað varð fyri eini brotssparkskapping.

Nógv fólk vóru komin út á fótbóltsvøllin, har vinnarin streyk avstað við eini flogferð fyri tvey til Aberdeen og aftur frá Atlantic Airways.

Kappingarreglurnar vóru einfaldar. Tað snúði seg um at fáa bóltin í málið, har ongir minni enn málmenninir báðir Jens Martin Knudsen hjá 1. deild hjá NSÍ og Tórður Thomsen, sum spælir í unglingadeildini hjá sama felag, stóðu millum stengurnar.

Brotssparkskappingin varð skjótt og væl avgreidd, og tá útvarpssendingin var liðug, kundi Jóhan Ásmund fara glaðbeintur aftur til húsa við eini flogferð í lummanum.

# Atlantsflog oljubjarging um hendi

OLJUVINNA
*Jan Müller*

Atlantsflog hevur gjørt avtalu við italska felagið ENI (Agip) um at standa fyri floglogistikkinum í sambandi við boringina á landgrunninum. Í mun til seinast borað varð á landgrunninum er "Search and Rescue" leiti- og bjargingarparturin við tyrluni hjá Atlantsflog nú partur av avtaluni. Hin parturin við flutningi av fólki til og frá boriskipinum verður gjørdur við eini tyrlu hjá Bristow, sum Atlantsflog leigar. Talan er um eina Bell 214 ST.



*Fyrsta manningarskiftið fór fram í gjár*
*Mynd: Edvard Joensen*

Magni Arge stjóri er fegin um, at tað hevur eydnast teimum at fáa leiti- og bjargingarpartin, tí hann er tann mest krevjandi og torføri parturin at fáa góðkenning til, so hetta er eitt stórt framstig fyri føroyska flogfelagið.

Magni Arge dylur ikki fyri, at tað er teirra mál at blíva offshoreoperatørur til at flyta fólk eisini. Her verður ikki minst hugsað um tað í framtíðini fer at verða nógv virksemi eftir møgulig fund. Tað eydnaðist ikki hesaferð, hóast felagið umsitur allan sáttmálan. Ein tyrla frá Bristow tekur sær av manningarskiftinum.

Vit spurdu Magna Arge, sum eisini er formaður í Oljuvinnufelagnum, um hann er nøgdur við føroysku luttøkuna í oljuleitingini. Hann sigur, at hann kennir ikki allar avtalurnar, so tað er ov tíðliga at siga, um man er nøgdur ella ikki. Men hann heldur tað vera rætt at gera eina eftirmeting, soleiðis at báðir partar kunnu brúka tað til nakað positivt.

- ENI hevur verið rættiliga miðvíst í sínum arbeiði at fáa føroyskar fyritøkur við í vinnuna undan sjálvari boringini. Vit eiga tí at síggja tingini sum eina samlaða heild.

Men tað er greitt, at tað hevur verið eitt sindur av ørkymlan, tí tingini eru komin í so seint á borðið, og okkurt bendir á, at samskiftið kundi verið betri.



*Fyrstu oljufólkini komu við hesum flogfarinum í gjár*
*Mynd: Edvard Joesen*

# Nú er aftur oljuvirksemi í Runavík

**Fyrsti útgerðarskipið á Runavík**

4. BRUNNURIN
*Jan Müller*



*Mynd: Ingrid Bjarnastein*

Fyrsta útgerðarskipið, sum skal flyta vøru og góðs millum Runavík og boriskipið Belford Dolphin kom á Runavík í vikuskiftinum. Talan er um North Vanguard, sum Gulf Offshore leigar út. Við skipinum eru rør til oljuboringina umframt bingjur o.a. Skipið fer vantandi út á leitiøkið um nakrar dagar. Sosialurin skilur, at stóra boriskipið hevur nokk av útgerð umborð til at arbeiða í eina viku ella meira. Talan er um "top hole section" tvs. tann ovasta partin av brunninum.

# Løgmaður farin til Brüssel

**Løgmaður fór mánadagin til Brüssel, har hann skal hava fundir við bæði ES og NATO. Talan er um bæði handilsligar og trygdarpotitiskar spurningar, sigur hann**

SAMRÁÐINGARFERÐ
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Mánadagin fór Anfinn Kallsberg, løgmaður, til Brüssel, har hann skal vitja bæði ES og NATO.

Í stuttari viðmerking segði løgmaður, tá Sosialurin hitti hann á flogvøllinum, at talan verður bæði um handilsligar og trygdarpolitiskar samrøður. Tó verður ikki so, at nøkur nýggj verjuavtala ella nakað sovorðið verður gjørt á ferðini, segði hann.

–Taka vit tað handilsliga fyrst, sigur løgmaður, so hava vit í nógv ár stríðst við at fáa tað Paneuropeisku kommulatiónsskipanina at galda fyri Føroyar. Nú gongur tað rætta vegin, men tað gongur seigliga, sigur hann. Vit brúka hvønn møguleika, sum er, og tað sær út til, at tað rekur við í løtuni, sigur løgmaður.

Trygdarpoltiskt er tað soleiðsi, at farið verður á fund við NATO aðalskrivaran, Geroge Robertson.

–Tað verða ikki nakrar størri samráðingar, men meira samrøður um at fáa sett hol á hetta her við at fáa innlit, ábyrgd og avgerðarrætt, sigur løgmaður.